Nr. 175 • mikudagur • 15. september 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# ítróttur

# Krøv verða sett til venjarar

**Komandi kappingarár verður kravt, at venjarar í 1. deild hjá monnum hava hægstu FSF-útbúgving ella eru byrjaðir upp á hesa**

FÓTBÓLTSVENJARAR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hetta er enn ein liður í tillagingini av føroyskum fótbólti, soleiðis at hesin kann lúka tey krøv, sum UEFA ásetur sum minstukrøvini til ymsu deildirnar í Europa.

FSF hevur í drúgt áramál havt venjaraútbúgving. Fyrst í samstarvi við DBU, sum í fleiri ár veitti skeiðsinstruktørar til FSF, og hesu seinastu árini hevur Fótbóltssambandið sjálvt staðið fyri hesum skeiðum.



Mynd: Rúni Heinesen
FSF hevur sum mál, at tað í 2010 skal bera til at seta krav um, at allir venjarar í bestu mansdeildini skulu hava lokið A-prógvið hjá Fótbóltssambandinum

### Markið er á nýggjárinum

Í leikskránni til landsdystin móti Fraklandi greiddi Rúni Heinesen, formaður í útbúgvingarnevndini, frá, at FSF hevur bundið seg til hesar treytir mótvegis UEFA, og at hesar treytir verða settar øllum teimum, sum skulu standa á odda fyri liði í bestu deildini.

Sjálvsagt er tað eisini so, at útlendskir venjarar ikki so gjarna hava eina FSF-útbúgving at vísa á, men hava hesir eina venjaraútbúgving, sum sampakkar við sonevndu UEFA-pro váttanina, verður hetta góðtikið, eins og Fótbóltssambandið kann velja at gera frávik. Sum útgangsstøði verður tó sagt, at frávik bert verða givin, um talan er um venjara, sum hevur í minsta lagi 5 ára royndir sum venjari hjá sáttmálaleikarum, og at hann ella hon í vetur fer í holt við at taka FSF-góðkendu venjaraútbúgvingina.

### Nýggj útbúgving

Tá FSF í sínum krøvum staðfestir, at talan skal vera um hægstu FSF-útbúgving, so verður í hesum sipað til sokallaða B-stigið. Tað eru tó longu nú fyrireikingar farnar ígongd, til tess at FSF sjálvt kann bjóða føroyskum venjarum skeið og prótvøku, soleiðis at hesir eisini kunnu røkka A-stignum, sum á pappírinum skal vera avloysarin hjá sonevndu elituvenjaraútbúgvingini.

Í løtuni er FSF í ferð við at útgreinað innihaldið í A-skeiðnum, soleiðis at hetta kann fáa góðkenning frá UEFA, og tá hetta er gjørt, er klárt at fara í gongd við sjálva útbúgvingina. Málið hjá FSF er, at A-skeiðið verður sett sum krav til heimligar venjarar í 2010.

### Mugu fylgja krøvunum

Rúni Heinesen, sum er formaður í útbúgvingarnevndini hevur havt hetta málið um hendi seinnu árini, og sjálvur sigur hann, at hetta er eitt arbeiði, sum FSF má gera, til tess at fylgja við menningini.

– Vit eru jú partur av UEFA, og hetta er so ein partur av teimum standardkrøvum, sum verða sett limalondunum. Endamálið við øllum hesum er sjálvsagt, at vit kunnu betra um góðskuna av venjingini og harvið eisini menna sjálvt fótbóltsspælið.

Rúni vísir samstundis á, at hetta er nakað, sum hongur saman við teirri loyvisskipan, sum FSF umvegis UEFA umsitur, og at kravið tí verður sett treytaleyst, tó við teimum undantøkum, sum eru nevnd omanfyri.

Hartil innibera nýggju minstukrøvini frá UEFA krav um, at eisini ungdómsvenjarar í ymsu feløgunum hava FSF-útbúgving. Verður hetta ikki uppfylt, er vandi fyri, at UEFA-pengarnir til ungdómsarbeiðið ikki verða goldnir felagnum.

– Okkara vón er í øllum førum, at vit kunnu eggja føroysku feløgunum at seta nógvar venjarar við. Hetta er eisini ein fortreyt fyri framhaldandi menning, og í FSF er málið í øllum førum, at vit skulu kunna vera sjálvsavgerandi í so máta, sigur Rúni at enda.

### Fer at raka

Tað er einki at ivast í, at nýggju krøvini kunnu koma at raka hampuliga hart í nøkrum av feløgunum í bestu deildini. Eitt nú hevur B36-venjarin, Jóannes Jakobsen, ikki lokið FSF-prógv sum venjari, og spurningurin er so, hvørji prógv teir útlendsku venjarar hava, sum í dag starvast hjá ymsu feløgunum. Her kann eitt nú Heine Fernandez í HB vísa á, at hann er í ferð við at taka donsku eftirútbúgvingina fyri yrkisleikarar. Aðrir útlendskir venjarar í Føroyum í ár eru Krzystof Popczynski í GÍ, Flindt Bjerg í KÍ og Piotr Krakowski í EB/Streymi.

At enda kann viðmerkjast, at teir venjarar, sum sambært kappingarskipann FSF's hava lokið elituvenjaraskeiðið, eru níggju í tali.

*Jóannes Jakobsen, sum í ár venur B36, er ein av venjarunum, sum kann verða raktur av nýggju krøvunum*





Svimjing:

## Góð byrjan hjá ungdómslandsliðnum

**Leygardagin var svimjikapping millum íslendska svimjifelagið Ægir og føroyska ungdómslandssliðið. Føroyska liðið var við yvirlutan í flestu kappingunum, og venjarin Petur Heðin á Fløtti, sigur, at hann var nøgdur við tað, sum hann sá**

SVIMJING
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Væl gekst hjá føroysku svimjarunum leygardagin. Teir vunnu nærum allar kappingarnar, og hóast talan bert var um eina stuttleikakapping, so var hetta ein góð byrjan upp á venjingina í ár*
*Mynd: SáH*

**Klaksvík:**
Íslendsku svimjararnir vóru í aldrinum 12 – 13 ár, meðan teir føroysku vóru 12 – 14 ára gamlir. Hetta gjørdi óivað sítt til, at føroyingarnir vunnu meginpartin av kappingunum. Men kortini má hetta sigast at vera ein góð byrjan upp á venjingina hjá svimjarunum.

Kappingin vardi tveir tímar, og eitt føroyskt met varð sett.

13 ára gamla Elspa Mørkøre úr Ægir í Klaksvík tók metið hjá Duritu Djurhuus í 50 m ryggsvimjing, sum hon setti á oyggjaleikunum á Álandi í 1991. Tað merkisverda er, at hetta var sama ár, sum Elspa varð født. Gamla metið var 32.79. Elspa svam teinin upp á 32.5. Eisini setti Elspa, sum júst er farin upp í bólk 4, trý bólkamet, so her er uttan iva talan um ein svimjara, sum hevur eina bjarta framtíð.

### Ov lágt støði

Petur Heðin sigur, at føroysku svimjararnir taptu bert tvær kappingar í hylinum í Klaksvík leygardagin, og tí viðgongur hann, at støðið hendan dagin kanska var í lægra lagi fyri teir føroysku svimjararnar.

– Men tað gekk fínt, og eg var eisini væl nøgdur við tað, sum eg sá, sigur føroyski venjarin.

Hann leggur afturat, at kappingarárið í Føroyum júst er byrjað, og tí eru svimjararnir kanska ikki rættiliga komnir í venjing enn. Tí kundi væl hugsast, at munurin hevði verið enn størri, um hendan kappingin lá nakað seinni á árinum.

Petur Heðin sigur, at tað er gott at byrja við kappingum beinanvegin í kappingarárinum, tí tað gevur byrjanini nakað eyka, sum annars ikki hevði verðið.

### Framgongd

Føroyska ungdómssvimjilandsliðið sá dagsins ljós fyri tveimum árum síðani. Tað fyrsta árið tóku ymiskir venjarar upp á skift sær av tí, men hetta seinasta árið hevur landsliðsvenjarin Petur Heðin á Fløtti tikið sær av tí. Men tað ger hann bert til aðalfundin hjá Svimjisambandinum. Tá tekur onkur annar yvir, sum skilst.

Petur Heðin sigur, at ungdómslandsliðið hevur stóran týdning fyri menningina av føroysku svimjingini. Her ber til at fáa fatur á ungum, evnaríkum svimjarum og halda teimum til á einum seriøsum støði.

– Her sær man eisini, hvør vil og hvør er við til stuttleika, sigur hann.

Tað hevur verið so, at tá svimjararnir eru farnir upp um 14 ár, so hava teir verðið sleptir upp á fjall, um ein kann siga tað so. Hetta fyri at staðfesta, hvussu teir klára seg, áðrenn teir kunnu koma á A-landsliðið. Hendan royndin vísti tó, at framgongdin hjá tí einstaka svimjaranum ikki var so góð, sum væntað, og tískil eru fleiri sloppin at halda fram á ungdómslandsliðinum fyri at halda teimum til. Og tað hevur sambært, Petur Heðini, givið úrslit tann rætta vegin.



*Petur Heðin á Fløtti hevur vant ungdómslandsliðið í svimjing tað seinasta árið. Hann var vælnøgdur við tað, sum hann sá til kappingina í Klaksvík leygardagin*
*Mynd: SáH*

## Góður túrur

**Um vikuskiftið hava svimjarar frá svimjifelagnum Ægi í Reykjavik verið á venjingarlegu í Klaksvík. Ferðaleiðarin hjá teimum lat væl at ferðini og segði, at tey høvdu góðar umstøður og fingu vant nógv**

SVIMJING
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Richard A. Hansen, sum er av føroyskari ætt, var ferðaleiðari hjá íslendska svimjifelagnum*
*Mynd: SáH*

**Klaksvík:**
Richard A. Hansen, sum er av føroyskari ætt, var ferðaleiðari hjá íslendska ferðalagnum, sum taldi 18 svimjarar um 12 – 13 ára aldur.

Svimjararnir vandu einaferð leygardagin og tvær ferðir sunnudagin. Leygardagin var so eisini ein kapping mest til stuttleika millum íslendararnar og føroyska ungdómslandsliðið.

Richard A. Hansen segði, at tey longi hava hugsað um at fara á eina venjingarlegu í Føroyum.

Tey høvdu ikki so nógva tíð, men ætlanin var møguliga at síggja okkurt, um stundir vóru til tað. Annars var tað mest í svimjihøllini, at ferðalagið nýtti tíðina. Tey búðu í skótahúsinum hjá Skótaliðinum Nólsoyar Páls.

Svimjararnir vóru vælnøgdir við ferðina, og Richard segði, at hann dugir væl at síggja fyri sær, at tey koma aftur til Føroya, men eisini at føroyingar koma handanvegin á venjingarlegu.

Íslendska ferðalagið kom til Føroya fríggjadagin og fóru av aftur landinum longu mánadagin.

## Sterkasta kapping í India

**Viswanathan Anand hevur givið indiskari telving øgiligan íblástur, og nú skipar heimsins størsta demokrati eisini fyri sterkum stórmeistarakappingum**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

34 ára gamli Anand - sum kanska er heimsins sterkasti telvari í løtuni - hevur næstan vunnið seg fram á Garry Kasparov. Einans 35 ratingstig eru á muni og skjótt fer Anand helst yvirum magiska 2800-markið. Hann hevur í løtuni 2782.

Slíkt bragd viðførir ein natúrligan áhuga í heimlandinum. Fyri umleið fýra árum síðani átti India einans tríggir stórmeistarar, men nú eru ellivu indiskir telvarar við sterka heitinum. Tann næsti eftir Anand í India, er Krishnan Sasikiran við 2666.

Eisini organisatoriskt førkar India seg frá einum talvligum u-landi til eitt lokkandi land at royna seg á teimum 64 puntunum. Í býnum Pune skipaðu talváhugaðir í døgunum 2-12. septembur fyri teirra fyrstu altjóða stórmeistarakapping. Miðalratinging fyri teir tíggju luttakararnir var heili 2630.

Rumenin Nisipeanu, ið nærkast 2700-markinum, legði út sum ein stormur og hevði leingi trygga leiðslu. Men eitt tap og nakrir javnleikir viðførdi at Fideheimsmeistarin Kasimzhanov loksins fekk hann aftur. Legendan Beliavsky, sum seinastu 30 árini hevur verið í topp 50, hevði eina heldur keðiliga kapping, men fekk tó eftir eina ringa byrjan bart seg uppá 50% skoru. Sasikiran skuffaði við einans fýra stigum.

Endaliga støðan

| | | |
|---|---|---|
| Nisipeanu | (2686) | 6,0/9 |
| Kasimzhanov | (2640) | 6,0 |
| Harikrishna | (2609) | 5,0 |
| Beliavsky | (2679) | 4,5 |
| Azmai | (2679) | 4,5 |
| Sandipan | (2555) | 4,0 |
| Sasikiran | (2666) | 4,0 |
| Ganguly | (2574) | 4,0 |
| Kunte | (2532) | 3,5 |
| Sutovsky | (2679) | 3,5 |

### Sigur í Østerbro

Terji Petersen og yvirritaði luttóku um vikuskiftið í einari talvkapping í Østerbro. Fimm umfør uppá tríggjar dagar.

Sjálvur var eg hægstrataður í ovasta bólkinum, sum taldi átta telvarar. Terji var næsthægsrataður. Við favorittrolluni lá eitt ávíst trýst á mær, og hóast til tíðir ótrygga telving, eydnaðist tað mær at vinna kappingina við 4,5 stigum. Terji, sum ikki hevur telvað eina kapping síðani FM 2003 í Havnini, kom ongantíð veruliga í gongd. Eftir at rustið varð bankað av sær, hevði hann 2,5 stig av teimum fimm umførunum.

## Talvið hesa vikuna

Kasimdzhanov,R (2640) - Sutovsky,E (2679)
Pune IND (9), 12.09.2004

1.e4 c5 2.Rif3 d6 3.c3 Rif6 4.Be2 Bd7 (Rixe4 er sjálvsagt tabu orsakað av Fa4+ og síðani Fxe4) 5.Fc2 Bc6 6.d3 Ribd7 7.Ribd2 Rc8 8.d4 cxd4 9.Rixd4 g6 10.0—0 Bg7 11.Rixc6 bxc6 12.Rib3 0—0 13.Be3 c5 14.Rad1 (Hvítur hevur kanska ein lítlan fyrimun við bispaparinum) 14...Fc7 15.f4 Fc6 16.Rid2 Rb8 17.Bf3 Fa6 18.b3 Rie8 19.Ric4 Rib6 20.Be2 Rixc4 21.Bxc4 Fa5 22.e5! dxe5 23.f5 Rid6 24.fxg6 hxg6



Støðumynd eftir 24...hxg6

25.Rxd6! (Helst vinnandi leikur, hóast lív er enn í støðuni) 25...exd6 26.Fxg6 Fxc3 (Einasti leikur fyri at verja g7) 27.Bh6 Fd4+ 28.Kh1 e4 29.Bxf7+ Rxf7 (Kh8 tapur vegna Fh5) 30.Fxf7+ Kh8 31.Fh5 Bxh6 32.Fxh6+ Kg8 33.h3 (Soleiðis, nú er rókurin leysur) 33...Fg7 34.Fe6+ Kh8 35.Rf5 1—0